## Nýggjan bát til útróður

**Skopun:** 77 ára gamli Mads Winther í Skopun (myndin) er gamal útróðrarmaður, men aldurin hevur ongan týdning. Hann hevur júst keypt sær nýtt far úr Íslandi. Báturin, ein Víkingur 800 er á veg heim til Føroyar. Gamli báturin hjá Mads, eitt 10-mannafar ið er bygt í Miðvági, stendur nú á Sølutorginum hjá bkv.fo. Mads byrjaði annars at rógva út sum 17 ára gamal.



## Skil fáast á bygdamørkini

**Runavík:** Hvar er markið millum Glyvrar og Saltangará? Henda spurning tók býráðið í Runavík støðu til á fundinum, sum varð hildin í gjár. Her varð ein tekning løgd fram um markið, og samtykti býráðið at fylgja hesi tilráðingini. Markið gongur millum annað eftir gamla útgarðinum millum bøin á Glyvrum og hagan, men fer annars framvið og gjøgnum traðir á leiðini. Byggi- og býarskipanarnevndin hevur havt málið til umrøðu, og varð teirra tilráðing samtykt. Spurningurin um markið millum Runavík og Saltangará varð eisini til viðgerðar, men her vórðu ongar broytingar gjørdar.

## Reinførið skal í hásætið

**Á bygdaráðsfundi mánadagin varð samtykt at førast skal ein reinførispolitikkur í Sandavágs kommunu**

KOMMUNA

*Snorri Brend*

**Sandavágur:** Fyri einum ári síðan varð farið undir samstarv við Almanna- og heilsumálaráðið, virkandi landslæknan, Per Vagn Hansen, og reinførissjúkrarøktarfrøðingin William Smith um at orða ein reinførispolitikk fyri at fyribyrgja sjúkum og ovurviðkvæmi.

Í dag er ikki loyvt at brúka sápur, krem ella líknandi, sum ikki er góðkent av danska Heilsustýrinum, eins og bert pappírshandklæði verða nýtt.

Síðan tíðliga í fjør hava allar sjúkur hjá starvsfólki og børnum í kommunalu stovnunum verið skrásettar, fyri at kanna, hvørja ávirkan reinførispolitikkurin hevur havt.

Umframt hetta er gjørdur ein reinførispolitikkur, sum greitt lýsir, hvat og hvussu ofta tað skal gerast reint. Hetta skal skjalfestast dagliga.

Øll starvsfólk, pedagogar, hjálparfólk, reingerðarfólk og onkur politikari hava verið á skeiði hjá Williami Smith, har undirvíst varð í reinføri, fyri at fáa fyribyrgt sum mest av sjúkum.

Skeið verður eisini børnunum, tí ætlanin er at William Smith skal hava skeið fyri teimum í, hvussu ein vaskar hendur.

- Hetta, at læra børnini at vaska hendur, er ikki nýtt á Sóljugarði. Tílíkt skeið varð fyri nøkrum árum síðan hildið fyri bæði børnum og vaksnum á stovninum, verður sagt á heimasíðuni hjá Sandavágs kommunu.

# Umsíðir viðurkend

**Eftir at hava samráðst síðani í summar, varð nýggjur sáttmáli undirskrivaður í gjárkvøldið millum Fíggjarmálaráðið øðrumegin og Almanna- og Heilsurøktarfelagið og Psykiatrifelagið hinumegin borðið**

FAKFELØG

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Argir:** - Nýggi sáttmálin er ein viðurkenning frá Fíggjarmálaráðnum av arbeiði okkum sum heilsurøktarar, siga Jóhanna Køtlum og Sjúrður Norðbú, sum hava samráðst saman fyri bæði feløgini.

Nýggi sáttmálin er galdandi fram til 1. oktober 2010 og er, sambært teimum báðum eitt greitt tekin um, at virðingin fyri arbeiðinum hjá heilsurøktarum kann lesast millum linjurnar í sáttmálanum.

- Í míni verð tóktist lítil ivi vera um, at tey untu okkum ein slíkan sáttmála, sigur Sjúrður Norðbúð við einum brosi.

Formenninir í báðum feløgunum eru samdir um, at samráðingarnar hava gingið sera væl – og hava verið merktar av virðing millum báðar partarnar.



*Sáttmálin verður undirskrivaður í Fíggjarmálaráðnum av Karstin Hansen, fíggjarmálaráðharra og formonnunum í Almanna- og Heilsurøktarfelagnum og Psykiatrifelagnum, ávikavist Jóhanna Køtlum og Sjúrður Norðbúð. Hetta er ein viðurkenning av okkara arbeiði, siga tey bæði*

Í Almanna- og Heilsurøktarfelagnum og Psykiatrifelagnum eru pleygarar, heilsurøktarar, sjúkrahjálparar, ítrivsvegleiðarar, neurofysiologassistentar og røktarheimsassistentar.

### Ein sáttmáli – eitt felag

Almanna- og Heilsurøktarfelagið og Psykiatrifelagið hava áður bæði samráðst fyri seg og saman, men við hesar samráðingarnar var eingin ivi um, hvat rættast var at gera.

Hetta hava verið góðar samráðingar og í góðum anda. Feløgini arbeiða saman og halda til undir somu lon, og sum skilst er áhugi fyri at arbeiða fram ímóti, at tey so líðandi fara at gerast eitt einstakt felag fyri heilsurøktararnar.

Hetta byrjandi samstarvið kunnu teir umleið 300 limirnir í báðum feløgunum longu fegnast um. Eitt úrslit av hesum er, at tað besta úr báðum sáttmálunum er sligið saman í ein góðan sáttmála fyri allar heilsurøktararnar kring landið.

- Her er nógv nýtt og gott í sáttmálanum. Talan er hálvavegna um eina uppudding í teimum undanfarnu sáttmálunum og ein útgreining, og tí kunnu vit ikki annað enn vera fegin um úrslitið, siga tey bæði.

### Vandaviðbót

Í sáttmálanum hjá Almanna- og Heilsurøktarfelagnum og Psykiatrifelagnum eru mong viðurskifti, sum uttan iva fara at gera sítt til at fleiri og fleiri hava hug at velja hetta arbeiðið sum yrkisleið teirra.

Í sáttmálanum er millum annað orðið førleikamenning komið inn, eins og eitt slóðbrótandi arbeiði er gjørt fyri at fáa eina sonevnda funksjónsviðbót inn, har møguleiki er hjá heilsurøktarum at arbeiða við verkætlanum í arbeiðstíð.

Lønartalvan er eisini regulerað, og eftirlønin er hækkað úr 12 upp í 15,8 prosent. Sáttmálin sigur eisini, at henda nú somuleiðis verður roknað av meirtímunum hjá limunum í feløgunum báðum.

Lønin er altíð viðkomandi í slíkum samráðingum. Lønin hækkar til sama støðið sum hjá øðrum fakfeløgum – og sum skilst verður arbeitt fram ímóti at allir bólkarnir fáa einu og somu lønartalvuna.

- Eitt annað punkt er, at vandaviðbótin hækkar við 100 prosentum. Og tað fegnast vit sjálvandi um, siga Jóhanna og Sjúrður.

# Útoyggjafólk stevna saman í Mykinesi

**Enn er dagurin ikki ásettur, men fólk á útoyggj og onnur áhugað kunnu í summar gleða seg til næstu stevnuna, sum verður hildin í vestastu oyggj okkara, Mykinesi**

ÚTOYGGJ

*Snorri Brend*

**Mykines:** - Vit ætla at gera eina áhugaverda skrá, siga umboð fyri Útoyggjafelagið.

Mánadagin hittust tey til fyrsta fundin at fyrireika Útoyggjastevnuna 2008. Fundurin varð sjálvandi hildin á staðnum – í Mykinesi.

- Eini 10 til 12 fólk møttu á hesum fyrsta fundinum og nógv góð hugskot vóru til skránna, verður sagt úr felagnum.

Tosað varð leysliga um skránna, men tað tykist verða greitt, at hon verður fjølbroytt og spennandi. Millum annað verður kapprenning, filmur, frásagnir í bygdini, tónleikur og dansur, tiltøk fyri børn eins og søla at mati og øðrum góðum.

- Skráin er opin enn, og tí kunnu fólk framvegis koma við góðum hugskotum til tiltøk, og bjóða seg til at hjálpa við praktiskum arbeiði, sigur felagið.

Útoyggjafelagið heldur sín árliga aðalfund í Mykinesi hendan dagin, og nógv útoyggjafólk nýta vanliga hetta høvið at savnast til álvara og gaman.

Skipað verður fyri flutningi til oynna og væntar Útoyggjafelagið, at nógv fólk fer at leita sær til Mykinesar henda dagin.

Allar útoyggjastevnurnar hava verið sera væl vitjaðar bæði av føroyingum og útlendingum. Og tað verður henda uttan iva eisini.